**Ársfrágreiðing hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum 2018**

Innihaldsyvirlit

**Vælkomin** ..... 1
**Heimildin at samráðast** ..... 3
**Lønarhagtøl** ..... 4
**Verkætlan – betur greinaði lønarhagtøl** ..... 4
**Sáttmálasamráðingar** ..... 5
**Sáttmálar endurnýggjaðir í 2018 - 2019** ..... 6
**Verkfall og verkbann** ..... 7
**Undantøk** ..... 7
**Arbeiðsmarknaðarlóggáva** ..... 8
**Eftirløn** ..... 9
**At enda** ..... 9
**Sáttmálar og avtalur** ..... 10
**Viðtøkurnar fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið** ..... 11

## Vælkomin

Góðu nevndarlimir og fundarfólk!

Eg skal við hesum bjóða tykkum hjartaliga vælkomin á ársfund hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er ein týðandi partur á almenna arbeiðsmarknaðinum og á kommunala sáttmálaøkinum. Felagið hevur sáttmálar og serstakar avtalur, sum fevna um øll starvsfólk í kommunalari tænastu, umframt øll starvsfólk í starvi hjá interkommunalu felagsskapunum SEV og IRF.

Sambært uppgerðini hjá Hagstovu Føroya fyri desember í 2018 er talið av starvsfólkum, sum virka innan almennar tænastur komið uppá 9.646. Ein vanligur býtislykil fyri starvsfólk í kommunalari tænastu í mun til starvsfólk í tænastu hjá landinum er 1/3, sum svarar til, at tað virka 3.215 starvsfólk á kommunala sáttmálaøkinum, harundir eisini SEV og IRF, meðan 2/3 av starvsfólkahópinum virkar á landsins øki, og svarar tað til 6.431 starvsfólk.

Tilsamans fyri allar vinnugreinar, harundir fiskivinnan, byggivinnan, privatar tænastur og almennar tænastur var tað fyri sama tíðarskeið í desember 2018 skrásettir 27.458 løntakarar.

Til samanberingar sæst niðanfyri í talvu 1 yvirlit yvir skrásettar løntakarar í Føroyum í 2017 býtt á kvinnur, menn og á vinnugreinar.

Talið av løntakarum í almennari tænastu er økt við 307 løntakarum frá 2017 til 2018.

| Løntakarar 2017 | |
|---|---|
| Løntakarar, kvinnur | 12.724 |
| Løntakarar, menn | 13.651 |
| Løntakarar, tilsamans | 26.375 |
| Í fiskivinnu o.a. ráevnisvinnu | 4.320 |
| Í bygging o.o. tilvirking | 3.908 |
| Í privatum tænastuvinnum | 8.811 |
| Í almennum tænastum | 9.336 |

*Talva 1* *Hagstova Føroya - dagført juli 2018*

Sami býtislýkil, sum nevndur er omanfyri, verður eisini nýttur í samband við býtið av lønarútgjaldingum innan almenna tænastu. Lønarútgjaldingarnar innan almennar tænastur í 2018 eru skrásettar at verða 3,135 mia. kr.

Sí niðanfyri yvirlit yvir lønarútgjaldingar í 2017 sambært seinastu almennu uppgerðina hjá Hagstovu Føroya fyri 2017.

| Lønargjaldingar 2017 | |
|---|---|
| Tils. í mió. kr. | 8.956 |
| - Fiskivinna o.o. ráevnisvinna | 1.866 |
| - Bygging o.o. tilvirking | 1.274 |
| - Privatar tænastuvinnur | 2.831 |
| - Almenn tænasta | 2.985 |

*Talva 2* *Hagstova Føroya - dagført juli 2018*

Lønarútgjaldingarnar innan almenna tænastu í 2017 eru skrásettar at verða 2,985 mia. kr. Sostatt økjast almennu lønarútgjaldingarnar við 150 mió. kr. frá 2017 til 2018.

Í talvu 2 síggjast eisini lønarútgjaldingar í 2017 fyri aðrar vinnugreinar, umframt lønarútgjaldingar býttar upp á kvinnur og menn.

Tá Kommunala Arbeiðsgevarafelagið varð sett á stovn í 2003, samráddist felagið um sáttmálar fyri kommunalt sett starvsfólk sett eftir sáttmála felagsins við Starvsmannafelagið, sum fevndi um starvsfólk í fyrisitingini, leiðarar, starvsfólk á havnunum, handverkarar o.o. Eitt annað stórt sáttmálaøki hjá felagnum um hesa tíðina var barnaansingarøkið, sum fyri ein stóran part varð skipað við dagrøktarskipanum kring alt landið og við einstøkum dagstovnum.

Dagstovnaøkið er nógv ment síðani yvirtøkuna av økinum í 2000. Talið á dagstovnum er vaksið nógv seinastu árini, og tað starvast fleiri enn 1000 starvsfólk á økinum í 2018, og svarar hetta til á leið 900 ársverk. Menningin av dagstovnaøkinum, hetta at vit hava fingið fleiri dagstovnar, hevur m.a. havt avleiðingar fyri dagrøktarskipanina, sum er nógv minkað seinastu árini. Talið av dagrøktarum liggur í dag um 50 ársverk.

Sáttmálaøkið hjá Starvsmannafelagnum hevur altíð verið eitt av okkara stóru sáttmálaøkjum, men hetta er eisini eitt øki, sum hevur verið undir støðugari menning – eitt øki við á leið 450 ársverkum.

Í 2006 og í 2007, tá ávikavist SEV og IRF gjørdust limir í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, tá fingu vit fleiri nýggjar sáttmálar at umsita, sum seinni eru lagdir saman við verandi sáttmálum felagsins. Hinvegin, so fingu vit við innlimanini av SEV og IRF eitt heilt nýtt sáttmálaøki at umsita. Talan er í hesum føri um sáttmálan fyri maskinmeistarar í starvi á SEV og IRF. Talið av maskinmeistarum í kommunalari tænastu liggur um 50 ársverk.

Við útleggingini av eldraøkinum 1. januar 2015 yvirtaka kommunurnar aftur eitt nýtt sáttmálaøki og fleiri nýggjar sáttmálar – og fyri ein part eisini fleiri serstakar avtalur um at fylgja sáttmálunum millum viðkomandi feløg og Fíggjarmálaráðið. Talan er um eitt nýtt sáttmálaøki, har tað hevur kravt nógva orku hjá starvsfólkunum í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum at seta seg inn í m.a. arbeiðstíðarreglur í samband við veitta tænastu alt døgnið, og tí hartil hoyrandi skiftandi arbeiðstíðirnar á økinum.

Eldraøkið er fyri kommunurnar eins stórt og víðfevnandi, sum dagstovnaøkið við góðum 900 ársverkum – og fleiri enn 1000 starvsfólkum.

## Heimildin at samráðast

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið varð sett á stovn við tí endamáli at samráðast um sáttmálar við tey fakfeløg, sum virkaðu á kommunala arbeiðsmarknaðinum. Tað vóru kommunufeløgini, Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag, sum í felag í 2003 stovnsettu Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, men tað vóru einstøku kommunurnar, sum vórðu limir í felagnum. Interkommunali felagsskapirnir SEV og IRF gerast limir í felagnum í ávikavist 2006 og 2007.

Við samanleggingini í eitt kommunufelag í 2014 fær Kommunala Arbeiðsgevarafelagið sína heimild at samráðast vegna kommunurnar gjøgnum eigararnar Kommunufelagið, Elfelagið SEV og Renovatiónsfelagsskapin IRF.

Hóast endamálið við nýggju kommunustýrislógini frá 2000 var, at kommunurnar skulu stýra egnum viðurskiftum í so stóran mun, sum til ber, so varð tað við ásetingini í § 5, stk. 5 latið landsstýrismanninum við Fíggjarmálum ein heimild at góðkenna allar sáttmálar og avtalur, sum kommunurnar gera. Haraftrat er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava allar flokkingar av størvum til góðkenningar, sum frammanundan ikki eru ásettar í einum av galdandi sáttmálum felagsins. Í hesum liggur kortini ikki, at hvør einstøk setanaravtala ella ítøkilig avtala, har eingin sáttmáli er, uttan víðari krevur góðkenning Fíggjarmálaráðsins. Hinvegin, so áliggur tað kortini kommununum, SEV og IRF at senda allar nýggjar flokkingar og lønir, sum ikki eru greitt ásettar í einum galdandi sáttmála til góðkenningar hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Annars er at siga, at §, 5, stk. 5 í kommunustýrislógini er ætlað til at halda eitt javnt lønarlag millum lønir hjá landinum og kommununum. § 5, stk. 5 er ikki ætlað til at forða fyri, at kommunalar lønir kunnu verða hægri ella lægri enn lønir hjá landinum, heldur skal ásetingin tryggja eitt ávíst samsvar millum lønirnar á almenna og á kommunala arbeiðsmarknaðinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hava nógvu seinastu árini havt eitt framúr gott samstarv, tá ræður um samráðingar og onnur mál av felags áhuga. Tó so, so er talan um tveir myndugleikar, sum í ávísum føri hava ymiska áskoðan á arbeiðsmarknaðar- og onnur sáttmálaviðurskifti. Fyri frameftir at tryggja eitt gott og javnbjóðis samstarv hava Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum gjørt avtalu um at gera eina rammuavtalu um skipan av framtíðar samstarvinum.

**Lønarhagtøl**

Ein av stóru uppgávunum hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum er at savna inn hagtøl til samráðingar.

Kommunurnar hava tíverri ikki eina felags skipan, har Kommunala Arbeiðsgevarafelagið kann heinta hagtøl, sum felagið hevur tørv á í samráðingunum við fakfeløg. Felagið má tí í flestu førum venda sær til einstøku kommunurnar fyri at fáa útvegað tey hagtøl, sum eru neyðug í sambandi við sáttmálasamráðingarnar.

At tað eru einstøku kommunurnar og stovnarnir, sum skulu samskipa hagtølini fyri hvør sítt øki er bæði tíðarkrevjandi og hevur stórar veikleikar við sær. Stórur vandi er fyri, at hagtøl vanta í, eru ófullfíggjaði soleiðis, at hagtølini m.a. ikki geva nóg neyvar útrokningar av karmi og kostnaði fyri einstøku økini.

Hagtølini fyri starvsfólk, sum virka á eldraøkinum eru skipaði partvís í skipanini hjá Føroya Gjaldstovu og í skipan, ið Tórshavnar kommuna hevur fyri tey, sum virka á eldraøkinum í kommununi.

Fyri at tryggja reglusemi og góðsku á kommunalum hagtølunum er tíðin helst komin hagar, at kommunali geirin eigur at umhugsa eina felags kommunala hagtalsskipan, so betri hagtøl fáast til vega.

**Verkætlan – betur greinaði lønarhagtøl**

Samferðslumálaráðið, sum varðar av arbeiðsmarknaðarmálum, kunnaði um ársskiftið 2018 um verkætlan við heitinum "Løn og arbeiðstíð".

Endamálið við verkætlanini er at betra um føroysku lønarhagtølini, bæði fyri at fáa greiðari hagtøl og fyri at fáa størri vitan um føroyska arbeiðsmarknaðin.

Samferðslumálaráðið hevur útnevnt fylgibólk, sum skal stuðla víðari arbeiðinum, sum annars er lagt undir Hagstovu Føroya.

Tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum - bæði arbeiðsgevarar og fakfeløg, sum eru í fylgibólkinum.
Fyri arbeiðsgevararnar luttaka umboð fyri ávikavist almennu, kommunalu og privatu arbeiðsgevarafeløgini.
Arbeiðsgevararnir eru: Fíggjarmálaráðið, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Arbeiðsgevarafelag.
Fyri løntakarafeløgini luttaka ávikavist 1 umboð fyri almennu fakfeløgini og 1 umboð fyri privatu fakfeløgini.

Fyrsta stigið í verkætlanini er at fáa greiðari lønarhagtøl um m.a.:
- Hvussu nógvar tímar føroyskir løntakarar arbeiða?
- Hvat er kostnaðurin av einum arbeiðstíma?
- Hvat kostar yvirtíðin, eyka ískoyti og pensjón?

Lønarhagtølini skulu kunna útgreinast á vinnugrein, sáttmálaøki, kyn, bústað, aldur, ríkisborgaraskap, fyri bæði almenna og privata geiran.

Ætlanin er síðani at útbyggja verkætlanina við fleiri neyvari lønarhagtølum, greiningum o.a.

**Sáttmálasamráðingar**

Fyri at taka samanum gongdina í samráðingarumfarinum 2017 – 2019/2020 og støðuna á almenna- og kommunala arbeiðsmarknaðinum, tá mugu vit byrja við at hyggja at fyrireikingunum til samráðingarnar, sum byrjaðu á vári í 2017.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið byrjaðu samráðingarumfarið við fundi, har partarnir tosaðu um støðuna, um gongdina í búskapinum og um útlitini á sáttmálaøkinum fyri komandi samráðingarumfarið. Partarnir samdust ávegis um karmarnar fyri sáttmálaskeiðið, áðrenn Fíggjarmálaráðið síðani legði støðið fyri samráðingarumfarið saman við Starvsmannafelagnum um miðjan oktober 2017.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fór síðani í samráðingar við Starvsmannafelagið við sama útgangsstøði, sum varð lagt í semjuni við Fíggjarmálaráðið. Tá samráðingarnar vóru komnar væl ávegis, tá gera Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar sermerktu semju sína, sum seinni skuldi vísa seg at fáa avleiðingar fyri allar eftirfylgjandi samráðingar á almenna og kommunala sáttmálaøkinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið fara síðani til samráðingar við Føroya Pedagogfelag. Tað gerst skjótt greitt, at Føroya Pedagogfelag undir ongum umstøðum fór at góðtaka karmin, sum varð lagdur í samráðingunum við Starvsmannafelagið.

Føroya Pedagogfelag kravdi at fáa somu treytir – og lønarhækkan til sínar limir, sum tær, ið vóru lagdar fyri dagin í semjuni millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Samráðingarnar vóru fastlæstar. Heitt var tí á Semingsstovnin, um at koma uppí samráðingarnar.

Um miðjan desember 2017 boðar Føroya Pedagogfelag frá verkfalli fyri allar leiðarar á dagstovnaøkinum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið umhugsaði støðuna, og svaraði aftur við at verkbanna øll starvsfólkini á dagstovnaøkinum.

Saman við Semingsstovninum gera partarnir tó fleiri royndir at finna semju, og eydnast hettar loksins um miðjan januar 2018.

Semjan millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur broytt fortreytirnar fyri samráðingunum. Farið er frá eini samráðingarskipan, har tað er tað fyrsta felagið, sum kemur til samráðingarborðið, sum leggur støðið fyri restina av samráðingarumfarinum. Støðan í dag er tann, at hvør samráðing er ein nýggj samráðing, øll vilja hava meira – ella, sum tað eitur “tað sama, sum sjúkrarøktarfrøðingarnir”.

Eftirfylgjandi samráðingarnar eru nógv merktar av hesi nýggju støðuni á almenna og kommunala arbeiðsmarknaðinum. Vit kunnu m.a. staðfesta, at samráðingarnar draga út, og hevur støðan eisini havt við sær, at fakfeløgini bíða leingi, áðrenn tey sleppa framat samráðingarborðinum. Fakfeløgini hava í fleiri førum víst sína ónøgd við longu bíðitíðina, og hevur hetta eisini elvt til nakað av mótstøðu í samráðingunum.

Kommunalu arbeiðsgevararnir hava eisini verið noyddir til at bíða leingi við at regulera lønirnar hjá starvsfólkunum.

Samráðingarnar fyri inniverandi sáttmálaskeið eru um at verða endaðar. Allir sáttmálar eru endurnýggjaðir og nakrar serstakar avtalur eru eftir at fáa uppá pláss.

Klárt er nú at fara undir fyrireikingarnar til komandi samráðingarumfar, sum byrjar í heyst.

**Sáttmálar endurnýggjaðir í 2018 - 2019**

1) Føroya Pedagogfelag – semingsuppskot 14. jan. 2018.
   3 ára sáttmáli, ið gongur fram til 1. okt. 2020.
2) Starvsmannafelagið og sáttmálin fyri dagrøktarar – semja 22. mars 2018.
   2 ára sáttmáli, ið gongur út 1. okt. 2019.
3) Heilsuhjálparafelag Føroya – semja 4. juni 2018.
   2 ára sáttmáli, ið gongur út 1. okt. 2019.
4) Danska Tannlæknafelagið – semja juni 2018
   2 ára sáttmáli, ið gongur út 1. okt. 2019.
5) Føroya Skipara- og Navigatørfelag – semja 4. juli 2018
   2 ára sáttmáli, ið gongur út 1. okt. 2019.
6) Maskinmeistarafelagið – semingsuppskot 19. okt. 2018
   2 ára sáttmáli, ið gongur út 1. okt. 2019.
7) Heilsurøktarafelagið – semja 30. nov. 2018
   2 ára sáttmáli, ið gongur út 1.okt. 2019.
8) Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna – semja 19. des. 2018
   2 ára sáttmáli, ið gongur út 1. okt. 2019.

9) Føroya Arbeiðarafelag fyri dagrøktarar – semja 28. feb. 2019
2 ára sáttmáli, ið gongur út 1. oktober 2019

## Verkfall og verkbann

Samráðingarumfarið 2017 – 2019/20 hevur verið nógv merkt av støðuni, sum tók seg upp í samband við verkfallið á sáttmálaøkinum hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar um miðjan oktober í 2017. Semjan millum Fíggjarmálaráðið og sjúkrarøktarfrøðingar bygdi á heilt onnur sereyðkenni samanborið við fyrstu semjuna, sum Fíggjarmálaráðið gjørdi við Starvsmannafelagið. Leisturin, ið varð lagdur í fyrstu semjuni varð brotin, og soleiðis hevur tað víst seg at verða trupult at halda ein og sama leist í eftirfylgjandi samráðingum á almenna- og kommunala arbeiðsmarknaðinum.
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fóru síðani til samráðingar um sáttmálan fyri námsfrøðingar og hjálparfólk á ávikavist almenna- og kommunala sáttmálaøkinum. Sum greitt er frá omanfyri, so vísti tað seg skjótt, at samráðingarnar við Føroya Pedagogfelag ikki fóru at bera á mál, og boð vóru send eftir Semingsstovninum.

Semingsstovnurin royndi í fleiri umførum semju millum partarnar. Aftaná at partarnir vrakaðu semingsuppskotið, ið varð lagt fyri partarnar 9. desember 2017, boðaði Føroya Pedagogfelag frá verkfalli at byrja 12. desember 2017. Á kommunala sáttmálaøkinum varð boðað frá verkfalli fyri leiðarar og varaleiðarar á kommunalu dagstovnunum, meðan tað á almenna økinum varð boðað frá verkfalli fyri allar leiðarar og samskiparar á stovnum undir Almannaverkinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið umhugsaði støðuna á kommunala sáttmálaøkinum, og tók síðani støðu til at svara aftur upp á verkfallið hjá Føroya Pedagogfelag – og boðaði frá verkbanni fyri øll starvsfólkini á kommunalu dagstovnunum frá 14. desember 2017. Verkbannið varð fráboðað við tí fyri eygað at fáa sáttmálapartarnar aftur til samráðingarborðið.

Semingsstovnurin royndi aftur at fáa semju í lag millum partarnar 28. desember, tó uttan at semingsuppskot varð lagt fyri partarnar.

Verkfallið og verkbannið á sáttmálaøkinum hjá Føroya Pedagogfelag helt fram inn í januar mánað 2018. Aftaná eitt drúgt verkfall – og verkbann á sáttmálaøkinum, har ósemjur stungu seg upp um m.a. undantøk og lønarútgjaldingar, gjørdu partarnir 14. januar 2018 semju um ein 3 ára sáttmála.

Seinni um heysti í 2018 boðar enn eitt fakfelag frá verkfalli á almenna sáttmálaøkinum. Hesaferð var tað Ljósmøðrafelag Føroya, sum boðaði frá verkfalli 8. november 2018.

## Undantøk

Arbeiðsmarknaðurin hevur undanfarna árið verið merkt av verkføllum, har spurningurin um undantøk hevur fylt nógv. Kjak um undantøk hevur somuleiðis verið stórur partur av samráðingunum, og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur havt sáttmálakrøv um undantøk. Tó er ikki borið á mál hesum viðvíkjandi. Harumframt hava kjak og trætur um undantøk – ella vantandi

undantøk - fylt almenna rúmið, og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur í tveimum umførum úttala seg um hesi viðurskifti.

Sum nevnt hevur kommunala sáttmálaøkið verið rakt av arbeiðssteðgi hjá Føroya Pedagogfelag. Kommunali geirin varð tó ikki raktur av trupulleikum í mun til vantandi undantøk, men hetta gjørdi seg í stóran mun galdandi á sáttmálaøkinum hjá landinum. Gerðarrætturin tók støðu til tvey trætumál um undantøk, og eftirfylgjandi vóru fleiri trætur um undantøk á Almannaverkinum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Í hesum sambandi lýstu miðlarnir fleiri støður, har brúkarar á Almannaverkinum og avvarðandi komu í klemmu av vantandi undantøkum, og somuleiðis varð víst á dømi, har brúkarar gjørdu stór heilsulig og námsfrøðilig afturstig vegna vantandi røkt.

Undan arbeiðssteðginum hjá Føroya Pedagogfelag var Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar í verkfalli, og á heysti 2018 var Ljósmøðrafelagið í verkfalli. Undir báðum verkføllum vóru vantandi undantøk ein stór avbjóðing hjá Fíggjarmálaráðnum og avvarðandi arbeiðsgevarum. Serstakliga í sambandi við verkfallið hjá Ljósmøðrafelagnum var almenna kjakið um vantandi undantøk harðligt, og leiðslan á Landssjúkrahúsinum førdi fleiri ferðir fram, at vandi var fyri trygdini hjá barnakonum og børnum.
Vantandi avtalur um undantøk seta framvegis lív og heilsu í vanda.

## Arbeiðsmarknaðarlóggáva

Føroyski arbeiðsmarknaðurin er í minni mun enn danski arbeiðsmarknaðurin reguleraður við lóg. Nakað av nýggjari arbeiðsmarknaðarlóggávu er framleidd seinastu árini, men tað er nógv eldri og grundleggjandi arbeiðsmarknaðarlóggáva, sum kundi verið dagførd, sum m.a. frítíðarlógin og starvsmannalógin. Hinvegin, so kann tað hugsast, at tað er neyðugt at endurskoða fleiri lógir um sama mundi, tá broytingarnar í eini lóg kunna ávirka aðra lóggávu. Ein dagførd arbeiðsmarknaðarlóggáva skapar tryggar karmar fyri bæði starvsfólk og arbeiðsgevarar.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er ein sjálvsagdur hoyringspartur á arbeiðsmarknaðinum, tá framdar verða dagføringar í galdandi lóggávu, og tá nýggj arbeiðsmarknaðarlóggáva verður send pørtunum á arbeiðsmarknaðinum til hoyringar.

Tað eru einans gjørdar smærri dagføringar í galdandi arbeiðsmarknaðarlóggávu í 2018. Haraftur ímóti hevur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fingið fleiri uppskot um lógarbroytingar til hoyringar í 2019. Vit kunnu m.a. vísa á nýggja og umfatandi lógaruppskotið um at banna mismuni og at tryggja javnrætti á arbeiðsmarknaðinum. Talan er um eitt viðkomandi lógarverk, men eisini eitt sera víðfevnandi lógarverk, sum er sent pørtunum á arbeiðsmarknaðinum til hoyringar við alt ov stuttari hoyringsfreist.

At lógaruppskot verða send til hoyringar við alt ov stuttari freist er vorðið alt meira vanligt. Hetta er sera óheppið, tí tað hevur týdning, at øll uppskot verða send til hoyringar soleiðis, at borgarar, vinnulív, almennir myndugleikar, stovnar o.o. fáa høvi at gera viðmerkingar og siga sína hugsan um lógaruppskotini.

## Eftirløn

Sáttmálarnir á kommunala og almenna arbeiðsmarknaðinum eru økissáttmálar, sum í útgangsstøðinum er galdandi fyri øll starvsfólkini, sum starvast á sáttmálaøkinum, sum sáttmálin fevnir um.

At sáttmálin er galdandi fyri øll starvsfólkini, sum starvast á sáttmálaøkinum, gevur øllum starvsfólkum – bæði limum og ikki limum - rætt til eftirlønargjald sambært sáttmálanum. Hinvegin, so meinar Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, at tað yvirskipað kann setast spurnartekin við, í hvønn mun partarnir á arbeiðsmarknaðinum, við bindandi virknaði fyri einstaka starvsfólki, kunnu avtala hvar og til hvørja eftirlønarskipan starvsfólkið skal rinda sína eftirløn.

Avtalur, sum fakfeløg gera við eftirlønarveitarar, skulu tryggja limum eins væl og ikki limum í fakfelagnum somu rættindi, tá ræður um pensjón og tryggingar.

Fleiri av teimum pensjónsavtalum, sum fakfeløg hava gjørt eru einans galdandi fyri limir í avvarðandi fakfelagi - m.a. tí meinar Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ikki, at tað er rætt at seta inn navngivnan eftirlønarveitara í sáttmálar á kommunala sáttmálaøkinum. Haraftrat gera pensjónsavtalur í fleiri førum mun á limum og ikki-limum í ávísum fakfelagi. At munur verður gjørdur á limum – og ikki-limum, er eisini ein forðan fyri, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið kann seta inn navngivnan eftirlønarveitara í kommunalan sáttmála – og forðar sostatt eisini fyri, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið kann áleggja einum ikki-limi at flyta sína eftirløn í eina eftirlønarskipan, sum hesin ikki er partur av, og har hesin ikki hevur møguleika at fáa eins góðar treytir, sum ein limur í fakfelagnum.

## At enda

Árið 2018 hevur verið eitt samráðingarár burturav. Starvsfólkini hava luttikið á óvanliga nógvum samráðingarfundum við fleiri fakfeløg. Í fleiri umførum hava nevndarlimir felagsins eisini luttikið í samráðingunum, kanska serliga móti endanum, tá finnast skuldi út av, um samráðingarnar bóru á mál. Tíbetur eydnast tað vanliga pørtunum at koma á mál – og at gera felags semju. Hinvegin, so er tað í nøkrum førum neyðugt at fáa ein triðja part inn yvir. Hesa ferð vóru tað samráðingarnar við Føroya Pedagogfelag og Maskinmeistarafelagið, sum endaðu við, at semingsuppskot varð lagt fyri partarnar.

Hetta samráðingarumfarið er loksins endað, og tíðin er komin til, at vit aftur mugu fyrireika okkum til komandi samráðingar í heyst, tá flest allir okkara sáttmálar fara úr gildi. Ein stórur partur av fyrireikingini liggur í arbeiðinum at gera eina rammuavtalu fyri framtíðarsamstarvið við Fíggjarmálaráðið, um hvussu vit skipa okkum í mun til einstøku sáttmálarnar – og ikki minst, hvussu vit samráðast á økjunum, har vit tiltraðka sáttmálarnar hjá Fíggjarmálaráðnum.

Hóast samráðingarnar eru ein sera grundleggjandi partur av arbeiðinum hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, so er tíð sett av til ymisk upplýsandi og kunnandi tiltøk, til netverkan o.a. – tað eru nokk at tríva í.

At enda vil eg takka nevndini fyri eitt sera gott samstarv og tykkum starvsfólkum fyri eitt gott arbeiði.

Takk fyri.

Annika Olsen, forkvinna

**Nevnd og starvsfólk í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum**

Í nevndini í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum sita:

Annika Olsen, Tórshavnar Kommuna
Bogi Bendtsen, SEV
Brandur Sandoy, Sands Kommuna
Jógvan í Skorini, Eiðis Kommuna
Pauli Trónd Petersen, Vestmanna Kommuna
Poul Andreas Joensen , IRF

Starvsfólk:

Anita Fuglø, leiðari
Marin á Brúnni, fulltrúi
Una Djurhuus Christiansen, fulltrúi

**Sáttmálar og avtalur**

- Føroya Pedagogfelag fyri námsfrøðingar og hjálparfólk
- Starvsmannafelagið, høvuðssáttmálin og sáttmálin fyri dagrøktarar
- Heilsuhjálparafelag
- Danska Tannlæknafelagið
- Føroya Skipara- og Navigatørfelag
- Maskinmeistarafelagið
- Heilsurøktarafelagið
- Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna
- Føroya Arbeiðarafelag fyri dagrøktarar

  Serstakar avtalur

  1. Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
  2. Akademikarafelag Føroya

3. Føroya Arbeiðarafelag – renovatión
4. Havnar Arbeiðarafelag – renovatión
5. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
6. Fysioterapeutfelag Føroya
7. Ergoterapeutfelagið
8. Kost- og Føðslufelag Føroya

**Viðtøkurnar fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

## § 1. Navn og limaskapur

*Stk. 1.* Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.

*Stk. 2.* KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommununfelagnum, stytt KF.

*Stk. 3.* Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF.

*Stk. 4.* Heimstaður felagsins er Tórshavn.

## § 2. Endamál felagsins

*Stk. 1.* Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:

• samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt

• røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommustýrislógina § 5, stk. 5.

• virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir

• gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið

• virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst

•við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

**§ 3. Upptøka**

*Stk. 1.* KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.

*Stk. 2,* Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

**§ 4. Útmeldan**

*Stk. 1.* Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.

*Stk. 2.* Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.

*Stk. 3.* Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

**§ 5. Ársfundur**

*Stk. 1.* Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.

*Stk. 2.* Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.

*Stk. 3.* Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.

*Stk. 4.* Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.

*Stk. 5.* Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør. Ársfundurin er viðtøkuførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.

Stk. 6 Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.

*Stk. 7.* Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra

b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.

c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi

d) Innkomin mál.

e) Ymiskt

**§ 6. Nevndin**

*Stk. 1.* Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.

*Stk. 2.* Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.

*Stk. 3.* Nevndin ger sína egnu starvsskipan.

*Stk. 4.* Nevndin velur sjálv formann og næstformann.

*Stk. 5.* Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.

*Stk. 6.* Nevndin er viðtøkuført, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.

*Stk. 7.* Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.

*Stk. 8.* Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

**§ 7 Skrivstovan**

*Stk. 1.* Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.

Stk. 2. Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.

*Stk. 3.* Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.

*Stk. 4.* Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

**§ 8 Limagjald**

*Stk. 1.* Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.

*Stk. 2.* Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.

*Stk. 3.* KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.

*Stk. 4.* Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

**§ 9 Tekning**

*Stk. 1.* Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

**§ 10 Samráðingarnevnd**

*Stk. 1.* Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.

Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.

*Stk. 2.* Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráðast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.

*Stk. 3.* Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

**§ 11 Roknskapur og grannskoðan**

*Stk. 1.* Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.

*Stk. 2.* Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

**§ 12 Tagnar- og upplýsingarskylda**

Stk. 1. Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.

*Stk. 2.* Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

**§ 13 Trætumál**

*Stk. 1.* Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.

*Stk. 2.* Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

**§ 14 Gerðarrættur**

*Stk. 1.* Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.

Stk. 2. Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.

*Stk. 3.* Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

**§ 15 Avtøka av felagnum**

*Stk. 1.* Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.

*Stk. 2.* Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

**§ 16 Gildiskoma**

*Stk. 1.* Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

Tórshavn hin 12. mars 2014